Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkismálum

Evni: Stuðul og útflutningur til Ukraina

Spurningar:

1. Hvørjar eru yvirskipaðu umstøðurnar fyri útflutning av føroyskum vørum til Ukraina?
2. Hvør er gongdin fyri útflutning av føroyskum vørum og tænastum til Ukraina?
3. Er grundarlag fyri at stuðla Ukraina búskaparliga við størri útflutningi av føroyskum vørum og tænastum?
4. Eru markaforðingar fyri útflutning av føroyskum vørum og tænastum til Ukraina?
5. Hvussu stórur partur av játtanini til neyðhjálp fer til Ukraina?
6. Halda samráðingarnar millum Føroyar og Evroasiatiska búskaparsamveldið um fríhandilssáttmála fram, hóast nýggju støðuna?
7. Hvønn leiklut hevur føroyska sendistovan í Moskva í samband við ósemjuna millum Russland og Ukraina?
8. Hevur landsstýrið nakrar ítøkiligar ætlanir um at stuðla Ukraina fíggjarliga, búskaparliga, politiskt, diplomatiskt ella á annan hátt í kjalarvørrinum á russisku innrásini?

Viðmerkingar:
Útflutningsvirðið til Ukraina var bert 4,6 miliónir krónur í 2016, men í 2021 var útflutningsvirðið 104,6 miliónir krónur[1]. Í tonsum vóru føroyskar fiskavørur 4,8% av samlaða innflutninginum av fiskavørum hjá Ukraina í 2020[2]. Tað er áhugavert at vita, hvørjir møguleikar eru fyri at stuðla Ukraina við at selja føroyskar fiskavørur til teirra, og hvørjar møguligar avbjóðingar og forðingar eru í hesum sambandi.

Føroyar hava í fleiri ár arbeitt miðvíst við at fáa handilssáttmála við Evroasiatiska Búskaparsamveldið (EABS)[3]. Eftir russisku innrásina í Ukraina er at kalla allur samhandil millum Russland og Føroyar hildin upp at, og føroyskir útflytarar hava flutt seg til aðrar marknaðir.

Ein av fremstu uppgávum hjá Sendistovu Føroya í Moskva hevur verið at virka til frama fyri einum fríhandilssáttmála við Russland og hini limalondini í Evroasiatiska búskaparsamveldinum. Tað er áhugavert at fáa innlit í, hvønn leiklut sendistovan í

[1] Hagstova Føroya
[2] UIFSA (Association «Ukrainian importers of fish and seafood»)
[3] EN: Eurasian Economic Union (EAEU)

Moskva hevur í dag, eftir at viðurskiftini millum Russland og restina av heiminum eru broytt so grundleggjandi.

At enda ynskist svar uppá, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur um at stuðla Ukraina í krígnum móti Russlandi.

Á Løgtingi, 12. august 2022

Bjarni Kárason Petersen